**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3895**
**Navn:** Sp/f ISUUS Mobile
**Adressa**:
Torfinsgøta 42,100 Tórshavn
**Kommuna:**
Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato**: 19.11.2004
**Viðtøkudato**: 19.11.2004
**Kapitalur**: Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur**: Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnarar**: Regin Weihe Dalsgaard, Tomgårdsvej 73, 1.th., DK-2400 København NV., Poul Laust Christiansen, Herningvej 5, lejl. 59, DK-9220 Ålborg Ø, Jens Pauli Rasmussen, Torfinsgøta 42, 100 Tórshavn og P/F Dynamic Paper, 100 Tórshavn (P/F 3310).
Stjórn: Regin Weihe Dalsgaard, Tomgårdsvej 73, 1.th., DK-2400 København NV.
**Tekningarreglur**: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: Sp/f Revisión v/Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár**: 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:**
19.11.2004 - 31.12.2005
**Endamál**: Endamál felagsins er at reka keyp/søla og at menna og selja samskiftisloysnir á altjóða marknaðinum.

Skráseting Føroya
tann 18. januar 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3246**,
Sp/f J. E. Export, 370 Miðvágur.
**Viðtøkur broyttar:**
08.12.2004.
**Partapeningur**: Hækking við kr. 50.000,00 til kr. 150.000,00
**Inngjaldingarháttur**:
Kontant kr. 50.000,00 til kurs 100.

Skráseting Føroya
tann 17. januar 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 207**,
P/F S.M.S., 100 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:**
15.10.2004.
**Nýtt hjánavn:** P/F Dvøljan (P/F S.M.S.)

Skráseting Føroya
tann 17. januar. 2005.

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. 2800**,
Færøernes Erhvervsudviklingsfond (Framtaksgrunnur Føroya), 100 Tórshavn.
**Nevnd**:
**Farin úr nevndini:** Eydna Justinussen, Dalakrókur 17, 100 Tórshavn.
**Innkomin í nevndina:** Rúna Hjelm, 950 Porkeri.

Skráseting Føroya
tann 17. januar. 2005.

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3706**,
P/F Faroe Finance, 100 Tórshavn.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Hákun Steingrímsson, Mikkjalstrøð 5, 100 Tórshavn og Árni Arge, Torsteinsgøta 2, 188 Hoyvík.
**Innkomin í nevndina:** Óli Meinertsson Hansen, Skotarók 16, 100 Tórshavn og Meinhard Jacobsen, Traðarbrekka 4, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya
tann 17. januar. 2005.

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3053**,
Sp/f Atlantic Fair, 600 Saltangará.
**Stjórn**:
**Farnir frá sum stjórar:** Áki í Skemmuni, 600 Saltangará og Andrias Jacobsen, 625 Glyvrar.
**Innkomin sum stjóri**: Dánial Petur Hansen, Gerðisvegur 24, 600 Saltangará.

Skráseting Føroya
tann 17. januar. 2005.

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3227**,
Sp/f 29/8-2001, 410 Kollafjørður.
**Viðtøkur broyttar:**
20.12.2004.
**Nýtt navn**:
Sp/f Norð-Streym
**Adressa**: 420 Hósvík.
**Nýggjur heimstaður:**
Hósvíkar Kommuna.

Skráseting Føroya
tann 17. januar. 2005.

Kristin Balle

---

# Pedagogur søkist til dagstovnin í Gøtu

1 pedagogur til starv fyri pedagog í barsil.
Arbeiðið er í vøggustovuni á Rókini, at byrja 29.03.2005 til 01.04.2006.
Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna.
Á stovuni er pláss til 14 børn í aldrinum 0–2 ár.
Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett.

1 avloysari søkist til arbeiðið, tá í fólk eru sjúk ella hava feriu.
Arbeiðið er um allan stovnin, við børnum frá 0–7 ár, at byrja 15.04.2005 til 01.01.06.

Dagstovnurin læt upp 1. februar 2000 og liggur í hugnaligum og barnavinarligum umhvørvi við Gøtugjógv.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsing um størvini fáast við at venda sær til Torgerð Hansen, tlf. 442012 lokal 10 ella fartlf. 218012
Skrivlig umsókn skal sendast okkum áðrenn mánadagin 14.02.05.
Bygdaráðið tekur sær rætt til frítt at velja ímillum umsóknirnar ella ongan at seta.

**Dagstovnurin í Gøtu**
**boks 32**
**511 Gøtugjógv**

---

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**

# Fulltrúi til Løgmansskrivstovuna

Ætlanin er, at Føroyar skulu hava virknari leiklut viðvíkjandi hjálp til menningarlond, eins og ætlanin er, at landið skal lata meira pening til hetta endamálið. Tí verður við hesum søkt eftir fulltrúa at samskipa føroyska menningarpolitikkin.

Meiri fæst at vita um uppgávur, førleikakrøv, starvsstaðið, setanartreytir og umsóknarfreist við at fara inn á heimasíðuna www.tinganes.fo

---

SÓLNISBÁTI

Aðalfundur verður 19. februar 2005.

Tíð og stað verður lýst seinni.

**Nevndin**

---

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

Søkt verður eftir

# fysioterapeuti við serútbúgving í lymfeødem viðgerð

Á fysioterapideildini á Landssjúkrahúsinum søkja vit eftir fysioterapeuti, sum hevur útbúgving í lymfeødemviðgerð. Arbeiðsuppgávan verður at viðgera sjúklingar við primer og sekunder lymfeødem. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Setan skjótast gjørligt.

Tú verður ein partur av fysioterapeut hópinum, men starvið er oyramerkt til lymfeødem viðgerð.

Á fysioterapideildini eru 11,0 fulltíðarstørv. Yvirfysioterapeutur, deildarfysioterapeutur, fysioterapeutar og sjúkrahjálpari, tilsamans 14 fólk.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta, at tú hevur útbúgving og áhuga í viðgerð av lymfeødem sjúklingum. At tú ert opin og álítandi og kann arbeiða sjálvstøðugt.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjun Poulsen, Yvirfysioterapeut, ella Karin Djurhuus, deildarfysioterapeut, tlf 304599 lok. 5790

**Løn- og setanartreytir**
sambært sáttmála millum Fysioterapeutfelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Freistin at søkja starvið er 18. februar 2005 kl 12.00

Skivlig umsókn, merkt "umsókn til starv", við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*

---

# Lærari til Porkeris skúla

Vegna farloyvi verður søkt eftir lærara til 9 t/viku frá 14. februar og til 30. juni 2005.

Tímarnir vera undirvístir týsdag, ónsdag og tórsdag fyrrapart.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi ónsdagin 2. februar.

Nærri fæst at vita frá skúlaleiðaranum tlf. arb. 373253 ella 262864.

**Porkeris skúlastýri**
**v/ Elken Bech, form.**
**FO 950 Porkeri**